# Summarjobb í Japan

**21 ára gamla Gunnleyg Berg úr Havn hevur fingið eitt heldur øðrvísi summarjobb. Hon hevur fingið starv hjá fyritøkuni SNG í japanska høvuðsstaðnum Tokyo, og hon hevur eisini fingið atgongumerki til HM-finaluna, sum hon lat 6.300 krónur fyri**



*HM-finalan verður spæld sunnudagin, og Gunnleyg Berg verður eisini til finaluna. Hon hevur fingið hendur á einum atgongumerki fyri "bert" 6.300 krónur*

*Mynd: Finnur Justinussen*

SUMMARJOB

*Stefan í Skorini*

Við flogfarinum hjá Atlantic Airways mikumorgunin var Gunnleyg Berg úr Havn. Hósdagin heldur hon leiðina víðari til Zürich og síðani tann langa teinin til Tokyo.

Hon hevur fingið starv hjá japansku fyritøkuni SNG í Japan, sum fæst við at selja fisk. Hetta er ein heimsumfevnandi fyritøka, sum eisini hevur eitt dótturfelag í Føroyum, ið selur fisk til Japan.

– Eg skal arbeiða hjá SNG í Tokyo í ein mánað, og so er ætlanin eisini, at eg skal til Kina við stjóranum at hyggja eftir nøkrum verksmiðjum hjá felagnum har, sigur Gunnleyg Berg, sum júst er liðug á Hægri Handilsskúla í Havn.

Hetta hevur eisini samband við, at hon ætlar sær niður á Handilsháskúlan í Århus at lesa HA eftir summarfrítíðina, og tí er hesin túrurin ein góð barlast at hava. Her fær hon høvi at síggja, hvussu virksemið hjá eini stórfyritøku úti í heimi fer fram.

Gunleyg hevur arbeitt hjá SNG í Føroyum. Hon vendi sær til stjóran og bað hann kanna møguleikan fyri at arbeiða í Japan eina tíð. Hetta varð fyriskipað, og nú er klárt at fara. Hon skal búgva á hotelli nær við skrivstovuna í Tokyo.

Hetta er ein risafyritøka, sum framleiðir meira enn samlaða bruttotjóðarúrtøkan hjá Føroyum. Arbeiðið hjá Gunnleyg fer fram á enskum, og tí skuldi ikki verið nakar trupulleiki við tí málsliga. Hon fer at arbeiða á tí deildini, ið tekur sær av tí evropeiska marknaðinum.

### Stuðlar Brasil

Sum kunnugt er HM-endaspælið í Japan og Suður Korea í hesum døgum. Finalan verður spæld í Tokyo á Yokohama International Stadion sunnudagin, og Gunnleyg hevur longu fingið sær atgongumerki til finaluna. Hon vendi sær til FSF, ið hevði atgongumerki at selja henni, sum onkur hevði avbestilt.

– Eg vóni, at Brasil kemur í finaluna, tí eg haldi við teimum, sigur Gunnleyg. Tá blaðið fór til prentingar var ikki greitt, um tað verður Turkaland ella Brasil, sum skal møta Týsk landi í finaluni sunnudagin.

Eitt atgongumerki til finaluna er ikki bíligt. Atgongumerki hjá Gunnleyg kostaði 6.300 krónur, men hetta er kategori 1, sum er eitt av teimum góðu plássunum á leikvøllinum.

– Eg gleði meg ómetaliga nógv at fara, og tað verður óivað ein spennandi ferð, sigur Gunnleyg at enda.




*Gunnleyg Berg sigur farvæl við vinkonur, áðrenn leiðin gongur til Japan, har Hon skal arbeiða hjá eini fyritøku í Tokyo í ein mánað*

*Mynd: Finnur Justinussen*

## Smyril vendi aftur

ÓHAPP

*Stefan í Skorini*

Stutt eftir at Smyril hevði lagt frá landi úr Havn týskvøldið, gjørdi skiparin av at venda við aftur til Havnar. Orsøkin var, at ein kona var dottin í eini trappu og hevði meitt seg so illa, at skiparin ikki helt tað vera ráðiligt at halda fram til Suðuroyar.

Konan bløddi í munninum og var í øðrviti. Tí helt skiparin, at best var um hon kom undir læknahond á sjúkrahúsinum.

Konan gekk niður ígjøgnum trappurnar av ovasta dekkinum, og tá hon kemur niður til tey seinastu trinini, dettur hon eftir høvdinum. Konan fekk ikki álvarsligt mein av óhappinum, tí hon varð útskrivað sama kvøldið.

Skipið var stutt uttan fyri molan, tá óhappið hendir. Skiparin vendi við aftur, og skipið misti hálvan tíma av hesum.



*Skiparin á Smyrli gjørdi av at venda við aftur til Havnar, eftir at ein kona var dottin í eini trappu umborð. Smyril var seinkaður hálvan tíma av hesum*

*Mynd: Finnur Justinussen*

## Miðsummarbál á Streymnesi

BÁL

*Stefan í Skorini*

Aftur í ár fara skótarnir í Hvalvík og á Streymnesi at skipa fyri miðsummarbáli við fótbóltsvøllin á Streymnesi. Bálið verður tendrað tann 29. juni klokkan 20.30.

Á skránni verður felagssangur við harmoniku, og røða verður hildin. Harumframt fara skótarnir at selja pylsur, sum kunnu steikjast við eldarnar. Høvi verður eisini at keypa sær ein kaffimunn við onkrum ábiti afturvið.

Fyrireikararnir heita á fólk um at taka grønu sangbók við.



Fiskasølan:

# Stóran umsetning, lítið yvirskot

**Fiskasølan hevði yvirskot áljóðandi 1,6 mió. kr. fyri 2001. Hetta er kortini ikki tað stóra, tí umsetningurin var 849 mió kr. Prísfalli á laksi og rækjum er størsta orsøkin til lítla yvirskotið**

ROKNSKAPUR

*Heri á Rógvi*

Føroya Fiskasøla P/F (Faroe Seafood) hevur havt aðalfund hin 24. juni 2002. Roknskapurin varð lagdur fyri aðalfundin og góðkendur.

Á niðastu linju í roknskapinum stendur at lesa, at Føroya Fiskasøla hevði eitt yvirskot áljóðandi 2,93 mió. kr. Eftir at myndugleikarnir í Føroyum, Fraklandi, Bretlandi og Danmark hava fingið sítt, so stendur 1,6 mió eftir hjá Fiskasøluni. Yvirskotið verður sum vant lagt afturat egingpeninginum, sum við ársenda 2001 var 66,2 mió kr.



*—Árið 2001 var merkt av óvanliga vánaligum marknaði fyri rækjum og stórum prísfalli á laksi í seinna hálvárinum. Hetta hevur ávirkað bruttovinningin munandi, sigur Hans Johannes á Brúgv, forstjóri.*

Virksemið hjá Fiskasøluni er søla og keyp av fiski (trading). Samlaði umsetningurin hjá Fiskasøluni var 849 mió kr. Hetta ger Fiskasøluna, ið Framtaksgrunnurin eigur, til størstu útflutningsfyritøkuna í landinum.

Hetta, at umsetningurin er so mikið stórur, men yvirskotið ikki er "størri" enn 1,6 mió, heldur forstjórin, Hans Johannes á Brúgv, vera ov lítið.

– Sæð í ljósinum av okkara umsetningi, so haldi eg ikki, at hetta yvirskotið hjá okkum er nakað stórvegis. Tað hevur verið trupult hjá okkum, og vit hava veruliga skula arbeitt fyri at tryggja okkum yvirskot, sigur Hans Johannes á Brúgv, sum hevur hug at geva sínum søluliði ábyrgdina av at niðastu tølini endaðu positiv úrslitinum.

Hyggja vit eftir árunum frammanundan, so gav 1998 eitt yvirskot áljóðandi 16 mió., 1999 6,6 mió og 2000 7,8 mió, so tað gongur skeiva vegin fyri Fiskasøluna.

– Árið 2001 var merkt av óvanliga vánaligum marknaði fyri rækjum og stórum prísfalli á laksi í seinna hálvárinum. Hetta hevur ávirkað bruttovinningin munandi, skrivar Fiskasølan í tíðindaskrivi.

Umsetningurin hjá Fiskasøluni var sum sagt 849 mió. kr. Dregur mann kostnaðinum av vørum og øðrum frá, so gjørdist bruttovinningurin 26,8 mió. Av hesum skal so dragast starvsfólkakostnaðurin, rentur og skattur, soleiðis at endaúrslitið gjørdist 1,6 mió í yvirskotið.

Fiskasølan eigur fleiri døtturfeløg, sum halda til í Danmark, Fraklandi og Stóra Bretlandi. Hesi spýta so øll í kassan hjá móðurfelagnum – koncern. Útlendskur fiskur myndar 10 % av umsetninginum hjá Fiskasøluni. Tað alt partur av strategiini hjá Fiskasøluni, at leggja tættari við marknaðinum. Áður hevur fiskasølan havt yvir hundrað fólk í starvi, men sita eini tjúgu í Føroyum.

Hans Johannes á Brúgv, forstjóri, sigur, at í ár gongur heldur betur, men úrslitið er einki at reypa av, sum hann tekur til.

– Tað er ein hørð kapping á økinum, og vit koma oftari í kapping við okkara egnu veitarar, tí hesir selja eisini sjálvir, sigur Hans Johannes á Brúgv.

### Nýggj nevnd

Nevndin fyri Fiskasøluna varð eisini skift út á aðalfundinum. Áður hevur nevndin verið felags fyri bæði Fiskavirking og Fiskasøluna, men hetta er nú broytt. Nevndin er eisini stytt niður í tríggjar nevndarlimir, ið allir eru nývaldir. Nýggja nevndin er mannað við Hákun Steingrímsson (formaður), Thomas Arabo (næstformaður) og Johannes Jensen.

Hákun Steingrímsson, sum til dagligt er deildarstjóri á Tryggingarfelagnum Føroyar, sigur, at teirra mál er eittans: at tryggja eigarunum eitt so gott úrslit sum gjørligt. Tað er Framtaksgrunnurin, ið hevur valt nevndarlimirnar. Formaðurin fyri Framtaksgrunnin, Niels W. Poulsen, sigur, at teir miðja eftir, at Fiskavirking og Fiskasølan skulu rekast sum sjálvstøðugar fyritøkur – lívført og sølubart.

Fiskasølan:

# Tættari at marknaðinum

**– Fiskasølan má koma tættari at marknaðinum, um vit skulu fylgja við tíðina og fáa størri vinning, sigur Hans Johannes á Brúgv, forstjóri í Fiskasøluni. Hann sigur, at teir oftani eru í kapping við sínar egnu veitarar**

FISKASØLAN

*Heri á Rógvi*

Fiskasølan hevur almannakunngjørt sín roknskap fyri 2001, sum vísti eitt yvirskot eftir skatt áljóðandi 1,6 mió. kr.

Hans Johannes á Brúgv, forstjóri fyri Fiskasøluna, sigur, at í framtíðini ætla sær at leggja seg tættari at marknaðinum.

– Fiskasølan má koma tættari at marknaðinum, um vit skulu fylgja við tíðina og fáa størri vinning, sigur Hans Johannes á Brúgv.

Fiskasølan hevur longu deildir í fleiri øðrum londum.

– Hetta er alt parturav ætlanini hjá okkum. Vit vilja vera so tætt at marknaðinum sum gjøligt, sigur Hans Johannes á Brúgv.

Forstjórin heldur, at teir má koma eitt lið longur fram í røðini.

– Tað er oftani soleiðis, at vit kappast við okkara egnum veitarar, sum eisini selja ein part sjálvir. Vit mugu vera við á fiskamarknaðinum, har vit á jøvnum føti kappast við aðrar, sigur Hans Johannes á Brúgv.

Tað er eisini ein ásannan av, at Fiskasølan eigur at tillaga seg, at forstjórin tosar um at koma eitt lið longur fram. Eitt nú Fiskavirking er farið at selja sín egnan fisk, og tað gera summi onnur virki eisini. Forstjórin vísur á, at teir hava nógv fleiri møguleikar at selja, og teir hava eitt størri tal av kundum enn onnur.

– Tað virkar fyri mær sum um, at fólk vilja hava sítt, og eingin skal koma inn á teirra øki, sigur Hans Johannes á Brúgv.

Nógv tann størsti parturin av søluni hjá Fiskasøluni er til lond í Evropa. Tíggju prosent av søluni hjá Fiskavirking er eisini við útlendskum fiski.



*Fiskasølan ætlar sær tættari at marknaðinum í Føroyum.*

Fiskasølan hevur sett pengar í fleiri fyritøkur, m.a. Dagsbrún, sum eigur stóran part av Føroya Fiskaídnaði, ið aftur eigur 75% av Havsbrún.

Forstjórin avvísir heldur ikki, at teir vilja fara at gera íløgur í fleiri fyritøkur, men enn er einki ítøkiligt. Stjórin roknar ikki við, at teir fara at keypa fiskavirkir.

### Einskilja sjálvandi

– Fiskasølan er fyri privatisering, sigur Hans Johannes á Brúgv. Hann hevur áður úttalað seg um, at Fiskasølan er egnað at privatisera, men hann ásannar, at seinasta ársúrslitið ger útlitini eitt sindur verri.

– Vit virka í dag sum ein privat fyritøka, sigur forstjórin.

Formaðurin fyri framtaksgrunnin, Niels W. Poulsen, sigur, at málið hjá teimum er, at Fiskasølan skal vera privatisera, men hann vil ikki seta nakað áramál á hetta. Hann leggur aftur, at teir eftir summarfrítíðina fara at hyggja nærri at ætlanunum við at privatisera fyritøkurnar hjá Framtaksgrunninum.